# Skulu heldur læra seg at tosa saman

**Stjórin á Strandferðsluni tekur ikki undir við, at manningarnar á Strandferðsluni skulu gerast til tænastufólk, fyri at sleppa undan verkføllum**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Manningarnar á Strandferðsluni skulu ikki gerast til tænastufólk.

Tað heldur stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen.

Sostatt tekur hann ikki undir við tankanum um at gera manningarnar á strandferðsluskipunum til tænastufólk fyri at sleppa undan teimum nógvu verkføllunum, sum javnan leggja siglina hjá Strandferðslnui lamna.

Serliga hevur Suðuroyggin verið hart rakt av verkføllum. Smyril er bundin at ikki færri enn fimm fakfeløgum: Skipara- og navigatørfelagnum, Maskinmeistarafelagnum, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Tað eru arbeiðarafeløgini, sum hava menninar, ið binda og loysa Smyril í Havn og á Drelnesi.

– Sostatt er Smyril ofta raktur av verkføllum. Og hesi verkføllini raka suðuroyingar serliga hart, tí hetta er eisini tann longsta siglingarleiðin til meginøkið.

Tí hava politikarar, vinnulív, ferðavinna, frítíðarfeløg og einstaklingar í fleiri ár tosað um at finna eina skipan, sum forðar fyri, at skipini verða rakt av verkfalli.

Og tann skipanin, sum oftast hevur verið nevnd, er at gera manningarnar til tænastufólk, tí hava tey ikki loyvi til at fara í verkfall.



### Fær ikki trupulleikar at hvørva

Men á evnisdegnum um samferðslu í Suðuroy seinasta leygardag, segði stjórin á Strandferðsluni, at hann tók ikki undir við hesum tankanum.

*Ein tænastumannaskipan fyri manningarnar hjá Strandferðsluni, fær ikki ósemjurnar at hvørva, sigur stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen*

Hann var púra samdur um, at tað líktust ongum, at siglingin hjá Strandferðsluni so oftani er rakt av verkfalli.

– Hetta kenna tey ikki til í øðrum londum um okkara leiðir og tað eigur heldur ikki at koma fyri í Føroyum, segði hann.

– Vit síggja tað ikki aðrastaðni og tað eigur heldur ikki at koma fyri í Føroyum, at lívæðrin til heilar landspartar, verður kvett av.

Men hann meinti ikki, at ein tænastumannalíknandi skipan fór at loysa trupulleikarnar.

– Ósemjur og frustratiónir hvørva ikki fyri tað, um manningin verður tænastufólk.

Hann sigur, at verða fólkini gjørd til tænastufólk, verður støðan tvørturímóti læst føst og tað er sera trupult at gera broytingar. Samtundis kann tað verða truplari at loysa ósemjur, tí ongin fær gjhørt nakað serligt.

– Og ein tænastumannalíknandi skipan, ger so ikki í sjálvum sær, at trivnaðurin ímillum partarnar, verður betri.

Hinvegin heldur hann, at partarnir, sum samráðast, eiga heldur at læra seg at tosa betri saman.

– Tað, at samráðast, er ein førleiki, sum alt annað og eg haldi, at hetta er ein førleiki, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at læra seg betri.

Men nakra patentloysn, hevur stjórin á Strandferðsluni kortini ikki.

# Meinhard letur seg ikki kroysta

**Stjórin á Føroya Fiskavirking tekur ávaringina frá Henriki Old, løgtingsmanni, púra róligt**

FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit lata okkum ikki kroysta av nøkrum sum helst.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking tekur ávaringina frá Henriki Old, løgtingsmanni, púra róligt.

Í Dimmalætting í gjár, krevur Henrik Old at fáa greið boð frá Fiskavirking um, nær virkið í Vági letur upp, og hvørjar ætlanirnar eru við virkinum.

Hann sigur enntá, at hann er til reiðar at fara til landsstýrismannin fyri at fáa hann at leggja trýst á Fiskavirking fyri at fáa greið boð um virkið í Vági.

Men hetta tekur stjórin í Fiskavirking púra róligt.

–Hetta er so greitt: Vit lata okkum ikki kroysta til nakað sum helst. Vit koma við eini fráboðan um virkið í Vági, tá ið vit eru til reiðar



*– Ístaðin fyri at hugsa so nógv um okkum, sum hava eitt so høgt virksemi sum gjørligt, áttu politikarar og fakfeløg heldur at hugsa um øll tey virkini, sum liggja still og um allan fiskin, sum fer óvirkaður av landinum, sigur Meinhard Jacobsen*

til tess og hvørki fyrr ella seinni enn tað, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann heldur, at vilja politikarar hava ávirkan nakrastaðni, skuldu teir heldir roynt at ávirka tey viðurskifti, sum meiri ella minni eru undir eini almennari skipan.

– Eitt nú kundu teir roynt at ávirka SEV fyri at fingið orkuprísin niður.

– Men, hvat Henrik Old, ella aðrir politikarar, leggja upp til viðvíkjandi Fiskavirking, er ikki okkara trupulleiki.

### Royna víðari

Annars sigur Meinhard Jacobsen viðvíkjandi virkinum í Vági, at samráðingar hava verið um at leiga virkið til Faroe Farming til at arbeiða laks í.

–Tær samráðingarnar endaðu úrslitaleysar, tí Faroe Farming er komið til ta niðurstøðu, at teir vilja heldur arbeiða laksin aðrastaðni. Sostatt hava hava vit tikið til eftirtektar, at í hesum sambandi koma vit ikki á mál.

– Men vit hava samtundis sagt, at vit fara at lata virkið í Vági uppaftur og tað lyftið ætla vit at halda.

– Og tá ið ein møguleiki fór fyri bakka, fara vit at leita eftir tí næsta. Og tá ið støðan er greið, skulu vit nokk siga frá.

– Men nær tað verður, og hvat tað verður, koma vit við eini fráboðan um, tá ið vit eru til reiðar til tað.

### Tekur onki frá føroyingum

Stjórin í Fiskavirking tekur tað sær heldur ikki nær, at Ingeborg Vinther í Sosialinum í farnu viku átalaði Fiskavirking fyri at gera virki í Hetlandi ístaðin fyri at skapa arbeiði í Føroyum. Hon meinti, at Fiskavirking hevur eina serliga skyldu at skapa arbeiði í Føroyum og tí heldur hon lítið um, at ætlanin nú er at gera eitt virki í Hetlandi.

– Vit hava gjørt av at kanna ein møguleika í Hetlandi. Vísir tað seg at vera grundarlag fyri einum lønandi virksemi har, gera vit tað.

– Tað tekur ikki eitt tað einasta arbeiðspláss frá føroyingum. Tvørturímóti kann tað vera við til at styrkja grundarlagið undir fyritøkuni, sigur Meinhard Jacobsen.

Annars heldur hann, at tað eigur ikki at koma óvart á nakran, at vit eru komin í trupulleikar. Vit hava fleiri ferðir ávarað um, at fór gongdin við alsamt hækkandi kostnaðarstøði, at halda fram, so fór at ganga galið.

– Og tað hevur tað gjørt!

– Vit hava vitað leingi, at marknaðurin fór neyvan at klára at fylgja við tí vøkstrinum, sum er í kostnaðarstøðinum í Føroyum. Prísirnir á heimsmarknaðinum fylgja ikki við hækkingini í kostnaðarstøðinum í Føroyum.

–Tá ið so fiskurin harafturat er smáfallandi, rakar tað eyka hart, tí tá er kappingarførið uppaftur verri. Og tí fer so nógvur fiskur av landinum, sigur Meinhard Jacobsen.

– Hetta er tann heilt einfalda støðan í einum nøtuhylki, leggur stjórin í Fiskavirking afturat.

### Venda kikaran skeivan veg

Annars vísir Meinhard Jacobsen á, at Fiskavirking er tann parturin av fiskivinnuni, har virksemið er størst.

– Vit royna at hava nógv virksemi, sum yvirhøvur gjørligt. Og ístaðin fyri at hugsa so nógv um okkum, sum royna at hava so nógv virksemi, sum gjørligt, áttu bæði Henrik Old og Ingeborg Vinther heldur at hugsa meiri um øll tey virkini, sum liggja still og at kalla ikki virka ein tann einasta stert.

– Og tey áttu eisini at hugsa meiri um allan tann fiskin, sum fer óvirkaður av landinum, sigur Meinhard Jacobsen. heldur enn at brúka allar kreftirnar uppá okkum, sum royna at hava so nógv virksemi sum gjørligt.



tvey gerast eitt

Dimmalætting BÓKAPRENT + HESTPRENT

FØROYAPRENT



Móttøka

Í samband við samanleggingini verður almenn móttøka fríggjadagin 25. juni á prentsmiðjuni á Hoyvíksvegnum 59 kl. 15 til 17.30. Vónandi nýta nógv viðskiftafólk, vinir og onnur høvi at koma framvið.

Í 126 ár hevur Dimmalætting rikið prentsmiðju. Í nítiárunum vórðu stórar íløgur gjørdar, so hon í dag er tann best útgjørda prentsmiðjan í landinum. Serstakliga hava íløgur verið gjørdar í litprenti, og stendur einasta 4-litaða prentmaskinan í fullari stødd á prentsmiðjuni hjá Dimmalætting. Á Dimmalætting er eisini ein vælvirkandi deild, ið ger undanprent til prentsmiðjuna.

Í 1984 stovnaði Jon Hestoy Hestprent, og verður hann stjóri á nýggja virkinum. Høvuðsframleiðslan hesi árini hevur verið bøkur. Í byrjanini var Hestprent eitt satsvirki, men í 1999 var byrjað at prenta eisini. Í 2002 víðkaði Hestprent so aftur virksemið sítt við bókbindarii, so virkið í dag fevnir um alt frá hugskoti til lidna vøru.

Við hesari samanlegging meta Pf. Dimmalætting og Spf. Hestprent seg hava tikið eitt stórt stig móti at tryggja Føroyum eina kappingarføra prentsmiðju, har vit framvegis vilja varðveita eitt opið og kundavinarligt umhvørvi.

FØROYAPRENT
Dimmalætting HESTPRENT